KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

# Klaksvíkar Býráð

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.04.2020 kl. 17:30 |
| **Málnr.:** | 16/01208 Gerðabók |
| Nevndarlimir: | Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Steinbjørn O. Jacobsen, Kristian Eli Zachariasen, Herfrí J. Sørensen, Óli M. Lassen, Tummas J. Lervig og Beinta Klakstein |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Onnur: | Tummas T. Eliasen, kommunustjóri |
| Protokollførari: | Jensa Anthoniussen, fulltrúi |

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 22/20 | 13/01072-132 | Velja stýrisbólk til miðbýarverkætlanir |
| 23/20 | 17/00642-49 | Regulering í byggisamtyktaráseting og økismarki |
| 24/20 | 20/00007-5 | Grundøkir, innkomnar umsóknir, mars 2020 |
| 25/20 | 16/00213-14 | Heygavegur v.m., framhald - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| 27/20 | 14/00665-156 | Vegir til eldri sethúsaøkir – *eykajáttan, fyrra viðgerð* |
| 28/20 | 20/00068-7 | Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e) – *eykajáttan, seinna viðgerð* |
| 29/20 | 20/00075-2 | Stuðul til upplating av endurnýtsluhandli í Klaksvík, Dugni - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |
| 30/20 | 20/00213-1 | Trivnaðarátak á Skúlatrøð - *flyting millum kontur, seinna viðgerð* |

## 22/20
## 13/01072-132 Velja stýrisbólk til miðbýarverkætlanir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2020 | 32/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2020 | 27/20 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2020 | 22/20 |

## 13/01072-132 Velja stýrisbólk til miðbýarverkætlanir

**Frágreiðing um málið:**
Í samband við byggingina av Biskupstorgi hevur ein stýrisbólkur koyrt verkætlanina við Kristian Rasmussen sum byggiharraráðgeva, og hevði stýrisbólkurin eisini ábyrgd av økinum uttan um bygningin. Tann verkætlanin er nú liðug, og er stýrisbólkurin tí endaður.
Í samband við víðari arbeiðið í miðbýnum eigur at verða settur ein stýrisbólkur, ið kemur at taka sær av uttanumøkinum.

Setan av stýrisbólki:
Byggireglurnar hjá Klaksvíkar kommunu siga, at ein 5 manna nevnd skal veljast at hava fulla ábyrgd fyri projektum omanfyri 10 mió. kr., tá ið hesi projekt verða framd, men kommunan hevur ongantíð brúkt tær reglurnar enn.

Ístaðin er ein byggiharraráðgevi settur, ið samstarvar við ein stýrisbólk, sum hevur evstu ábyrgd. Kommunan hevur í hesum sambandi biðið viðkomandi nevndir og býráð gjørt frávik frá byggireglunum, tí talan er um eina strangari skipan.

Høvuðsuppgávan hjá stýrisbólkinum er at tryggja, at kommunan fær arbeiðið til rættan kostnað, til røttu tíð og við umbidnari dygd.

Sambært praksis hjá kommununi manna hesi stýrisbólkin:

1. Borgarstjórin er formaður, JS
2. Kommunustjórin, TTE
3. Formaðurin fyri nevndina, sum "eigur" verkætlanina, KEZ
4. Stjórin fyri fyrisitingina, sum "eigur", ÓJB
5. Tekniski stjórin, ÓJB
6. Stjórin fyri stovnin, sum byggir (ongin í hesum førinum)
7. Byggiharraráðgevin; byggiharraráðgevin er fundarskrivari, SíE

Um mett verður, at aðrir persónar skulu luttaka á fundi, ella á einstøkum fundi, so kallar formaðurin fyri stýrisbólkurin hesar inn.

**Lógargrundarlag:**
Byggireglurnar fyri Klaksvíkar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongin viðmerking

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir nevndini til at taka undir við tilmælinum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 10-03-2020.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við UBN 20-04-2020.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá FíN 28-04-2020 einmælt samtykt.

## 23/20
## 17/00642-49 Regulering í byggisamtyktaráseting og økismarki á Syðradali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2020 | 38/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 28.04.2020 | 29/20 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2020 | 23/20 |
| 4 Syðradalsnevndin | 05.05.2020 | |

## 17/00642-49 Regulering í byggisamtyktaráseting og økismarki á Syðradali

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til býráðssamtykt frá 27.02.2020, har tikið verður undir við tilmælinum frá Syðradalsnevndini og Umhvørvis- og býarskipanarnevndini um m.a. at kanna møguleikan fyri bygging av sethúsum sunnanfyri minnisvarðan í bygdini.
Samstundis verður tikið undir við tilmælinum um at halda fast við sethúsaøkini í bygdaætlanini frá 1987-1999.

Tekniska fyrisiting staðfestir:
Í fyriliggjandi bygdaplani 1987-1999 fyri Húsa kommunu er útlagda sethúsaøkið sunnanfyri minnisvarðaognina uml. 7 metrar breitt. (Økismarkið millum sethúsaøkið og fríøkið gongur umleið miðskeiðis gjøgnum matr.nr. 42, sum er partur av landsjørð) (sí útklipp av verandi bygdaplani á viðhefta skjali I)

Verður støða tikin til at flyta økismarkið soleiðis, at sethúsaøkið umfatar alla breiddina av matr.nr. 42 niðri við vegin, er møguleiki fyri einum sethúsagrundøki uppá uml. 320 $m^2$ her (sí mynd á viðhefta skjali II)

Treytin fyri, at hetta kann lata seg gera, er, at býráðið samtykkir, og landsins myndugleikar góðkenna broyting í byggisamtyktini soleiðis:

- Minst loyvda grundøkjavídd á Syðradali fer úr 400 $m^2$ til 300 $m^2$. *(Almenna Byggisamtyktini fyri Klaksvíkar kommunu umfatar, sum er, bygdirnar: Klaksvík, Árnafjørð, Norðoyri, Ánirnar, Strond, Mikladal, Trøllanes og skjótt eisini Svínoy. Her er minst loyvda grundøkjavídd 300 $m^2$, og hevði hetta tí verið eitt náttúrligt upplegg eisini at galda fyri bygdirnar Syðradalur og Húsar, tá byggisamtyktin fyri Húsa kommunu – eftir ætlan í nærmastu framtíð - verður samantvinnað við Almennu byggisamtyktina fyri alla kommununa)*

- Sethúsaøkið verður víðkað uml. 8 metrar inn yvir fríøkið. *(Tekniska Fyrisiting metir hetta ráðiligt, eftirsum fríøkið norðanfyri ánna er uml. 26 metrar breitt (og við broytingini minkar niður í uml. 18 metrar), meðan tað sunnanfyri ánna er uml. 14 metrar)*

**Lógargrundarlag:**
Býarskipanarlógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Í samband við byggisamtyktarbroytingina: ongar
Í samband við lendiskeyp frá Búnaðarstovuni: uml. kr. 20.000,- at fíggja av *Byggibúning Bústaðir*.
Peningurin kemur innaftur við sølu av grundøkinum.

**Tilmæli:**
Tekur býráðið undir við uppskotinum omanfyri, verður tilgongdin við byggisamtyktarbroyting sett í verk sum skjótast, og mælir Tekniska Fyrisiting til, at Syðradalsnevndin verður kunnað um málið á fyrst komandi fundi í nevndini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 14-04-2020.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við UBN 20-04-2020.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá FíN 28-04-2020 einmælt samtykt.

## 24/20
## 20/00007-5 Grundøkir, innkomnar umsóknir, mars 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2020 | 39/20 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 30.04.2020 | 24/20 |

## 20/00007-5 Grundøkir, innkomnar umsóknir, mars 2020

**Frágreiðing um málið:**
Í dag eru 94 borgarar á grundstykkjalistanum. Síðan seinastu kunning eru 5 borgarar komnir aftrat á listan og 2 farnir av.

Fyrisitingin hevur somuleiðis dagført grundstykkjalistan yvir tøk grundstykkir í Klaksvíkar kommunu við tí fyri eyga at leggja dagførda listan á heimasíðu kommununnar, sí skjøl *Yvirlit yvir tøk grundøkir í Klaksvíkar Kommunu 17022020, Kort_Millum Hjalla 0303202* og *Kort_Árnafjørður 03032020.*

Aftrat teimum 18 tøku grundøkjunum millum Hjalla, eru 6 tøk grundøkir, hesi eru matr.nr. 1006bn, 1006bm, 1006bl, 1006bk, 1006bi, 1006bh, ið áður hava verið útlutað í samband við verkætlanina um raðhúsa- og íbúðabygging.

**Lógargrundarlag:**

-

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

Skjøl:
*Journal nr.: 20/00007-6 - Yvirlit yvir tøk grundøkir í Klaksvíkar Kommunu 17022020*
*Journal nr.: 20/00007-6 - Kort_Árnafjørður 03032020*
*Journal nr.: 20/00007-6 - Kort_Millum Hjalla 0303202*

**Tilmæli:**
Fyrisitingin mælir avvarðandi nevnd og býráð til støðutakan viðv. at seta matr.nr. 1006bn, 1006bm, 1006bl, 1006bk, 1006bi, 1006bh á yvirlitið yvir tøk grundøkir.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 09-03-2020.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá UBN 20-04-2020 einmælt samtykt, treytað av, at raðhúsa- og íbúðabygging framvegis verður ein møguleiki millum Hjalla.

## 25/20
## 16/00213-14 Heygavegur v.m., framhald – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.02.2020 | 24/20 |
| 2 Tekniska Nevnd | 19.02.2020 | 13/20 |
| 3 Fíggjarnevndin | 25.02.2020 | 17/20 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 27.02.2020 | 12/20 |
| 5 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 30.04.2020 | 25/20 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 27. feb. 2020.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:**
Nevndin mælir til at bíða við at fremja kloakkarbeiðið á Eiðinum og í staðin at umraðfesta avsettu upphæddina, 2 mió. kr., til verkætlanina á Heygavegnum. Harnæst mælir nevndin til at flyta 0,4 mio. kr. frá *Byggibúning, bústaðir* til *Kloakkir, íløga*.

**Tekniska Nevnd 19. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við UBN 17-02-2020.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við TN 19-02-2020.

**Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:**
Tilmælið frá FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá BýR 27-02-2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 27/20
## 14/00665-156 Vegir til eldri sethúsaøkir – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 20.04.2020 | 33/20 |
| 2 Tekniska Nevnd | 22.04.2020 | 23/20 |
| 3 Fíggjarnevndin | 28.04.2020 | 28/20 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 30.04.2020 | 27/20 |
| 5 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 28.05.2020 | |

## 14/00665-156 Vegir til eldri sethúsaøkir

**Frágreiðing um málið:**
UBN, TN og Býráðið hava raðfest fyrstu fýra økini í Klaksvík, sum ikki hava koyriveg til húsini. Sí lista í yvirliti niðanfyri. Í januar 2019 hava nevndirnar og býráðið viðgjørt eitt uppskot um parkeringspláss og veg til raðhúsini omanfyri Stangavegin, og samtykt er, at málið skal fremjast í ár. Talan er sostatt um 5 raðfest økir.

Sethúsaeigara í økjum við ongum vegi spyrja javnan eftir málinum, oftast munnliga, men eisini skrivliga. Seinasta skrivliga umsóknin er komin frá borgara, Stangavegur 112:




Sí viðhefta umsókn og fyrsta svarskriv til Sáru Petersen. Umsitingin hevur mett ein møguligan vegastubba til at kosta einar 500 tkr. Málið er torført at loysa, og serligar avbjóðingar eru við

Kósabrekkuni, sum er brøtt, smøl og útsýnið er vánaligt. Kósabrekkan krevur eisini ábøtur. Stórur møguleiki er fyri, at kostnaðurin av samlaða arbeiðinum gerst størri enn 500 tkr.

Sum áður upplýst, hevur kommunan eisini fingið fyrispurningar frá sethúsaeigarum um lendiskeyp í øki nr. 4 og 5, frá tveimum ella trimum sum skulu lata lendi til vegin. Eigara, sum liggja við Víkavegin, eru áhugaðir í at fáa málið um lendið upp á pláss, innan ov long tíð gongur. Viðkomandi hava sjálvi veg til sethús síni, men skulu lata lendi, so onnur fáa veg.

Sambært samtykt í januar 2019 skal Tekniska Fyrisiting fara í samráðingar við lendiseigara í øki nr. 2, 3, 4 og 5.

Víst verður til dagført yvirlit, har raðfestir vegir – og vegir sum ikki eru raðfestir – eru settir upp.

**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Talan verður um eykajáttan, tí peningur er ikki raðfestur til pkt. 4 og 5.

**Tilmæli:**
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir til viðgerðar/støðutakan.

Tekniska Fyrisiting hevur hesa viðmerking til málið: Samtykta raðfestingin 1 til 5 í talvu kostar um einar 5 mió. kr. - Tá er roknað við, at liðugtgerð av Garðsgøtu kostar uml. eina mió. kr.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 20. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við at raðfesta vegin til Sáru Petersen sum nr. 6 á listanum, men liðugtger pkt. 1-3, áðrenn farið verður víðari við øðrum økjum.

**Tekniska Nevnd 22. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við UBN 20-04-2020, og at tað framhaldandi verður arbeitt við lendiskeypi til pkt. 4 og 5 (Búðaskákið og Líggjasarbrekka).

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2020:**
Nevndin tekur undir við TN 22-04-2020.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá FíN 28-04-2020 einmælt samtykt.

## 28/20
## 20/00068-7 Atkomuvegur til eyrmóttøku á Bumshamri (matr.nr. 1e) – *eykajáttan, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 17.02.2020 | 30/20 |
| 2 Havna- og Vinnunevndin | 18.02.2020 | 11/20 |
| 3 Tekniska Nevnd | 19.02.2020 | 20/20 |
| 4 Mentanarnevndin | 18.02.2020 | 18/20 |

| | | |
|---|---|---|
| 5 Fíggjarnevndin | 25.02.2020 | 16/20 |
| 6 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 27.02.2020 | 15/20 |
| 7 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 30.04.2020 | 28/20 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 27. feb. 2020.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 17. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við málinum og játtar 0,3 mió. kr. til verkætlanina av *Byggibúning, bústaðir*.

**Mentanarnevndin 18. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við málinum og játtar kr. 300.000,- til verkætlanina av *Ítróttarøkið, Íløgur (Rennibreytin).*
Havandi í huga at økið skal brúkast til skjótibreyt, heita vit á umsitingina at taka atlit til hvussu avgrevsturin verður lagdur.

**Havna- og Vinnunevndin 18. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við málinum og játtar kr. 300.000,- til verkætlanina av *Byggibúning, ídnaðarøkir (Undir Hamri).*

**Tekniska Nevnd 19. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við málinum og játtar 300 tkr. av kontuni *Vegir, íløgur (tøkt til aðrar vegagerðir)*

**Fíggjarnevndin 25. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við UBN 17-02-2020, MeN og HaVN 18-02-2020 og TN 19-02-2020.

**Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:**
Tilmælini frá UBN 17. feb. 2020, MeN og HaVN 18. feb. 2020, TN 19. feb. 2020 og FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá BýR 27-02-2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 29/20
## 20/00075-2 Stuðul til upplating av endurnýtsluhandli í Klaksvík, Dugni – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 21.01.2020 | 3/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 04.02.2020 | 11/20 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 27.02.2020 | 14/20 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 30.04.2020 | 29/20 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 27. feb. 2020.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 21. januar 2020:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 14-01-2020.

**Fíggjarnevndin 4. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við B&U 21-01-2020.

**Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:**
Tilmælið frá FíN 4. feb. 2020 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá BýR 27-02-2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

## 30/20
## 20/00213-1 Trivnaðarátak á Skúlatrøð – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 18.02.2020 | 13/20 |
| 2 Fíggjarnevndin | 25.02.2020 | 21/20 |
| 3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð* | 27.02.2020 | 13/20 |
| 4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð* | 30.04.2020 | 30/20 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 27. feb. 2020.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 18. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 11-02-2020

**Fíggjarnevndin 25. februar 2020:**
Nevndin tekur undir við B&U 18-02-2020.

**Klaksvíkar Býráð 27. februar 2020:**
Tilmælið frá FíN 25. feb. 2020 einmælt samtykt.

**Klaksvíkar Býráð 30. apríl 2020:**
Tilmælið frá BýR 27-02-2020 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

**FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI**